

## ÁÐRENN:

Anna hevur sethúsalán við eini lítlari restskuld. Hon kundi tó hugsað sær at havt størri fíggjarligt rásarúm nú, áðrenn børnini øll eru floygd, eitt nú til at ferðast ella bara hjúkla um familjuna.

**Anna Dahl Olsen**
44 ár
Skrivstovukvinna
Gift við Johannes
Trý børn, 12, 17 og 20 ár





Føroyar vunnu tvey bronsumerki í NM í boccia




Umstøðurnar at kap
eydnaðist væl

# Føroyar vunnu tv

**Stór norðurlendsk boccia-kapping var í Føroyum um vikuskiftið. 60 fólk vóru við í kappingini, og tað eydnaðist Føroyum at vinna tvey bronsumerki**

BOCCIA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Ítróttarsambandið hjá teimum brekaðum stóð um vikuskiftið fyri stórari NM-kapping í Havn. Tríggjar ítróttarhøllir í høvuðsstaðnum vórðu brúktar til kappingina, har eini 60 luttakarar úr øllum norðurlondum vóru við.

Luttakararnir hava ymisk brek, og teir vóru býtt upp í bólkar – alt eftir hvussu teir eru fyri.

Átta føroyingar vóru við í kappingini, og teir vóru: Áki Joensen, Otto Nicolajsen, Jonhard Brøðraberg, Heðin Midjord, Johannes Ziska, Jógvan Telling Joensen, Danjal Jákup Djurhuus og Marius Johansen.

Venjari er Dan Lamhauge.